

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 12 - 2011

# Iran sleppur ikki at steingja Hormuz-sundið

USA ætlar sær ikki at sita hendur í favn, um Iran ger álvara av hóttanini um at steingja Hormuz-sundið, sum oljan úr Persaflógvanum fer ígjøgnum. -Fríur vøru- og tænastuflutningur ígjøgnum Hormuz-sundið er avgerandi fyri menningina bæði í tí lokala økinum og um allan heim, segði ein talsmaður fyri amerikonsku herflotastøðina í Bahrein í gjár. Orðini vóru ætlað sum svar upp á eina hóttan úr Iran, sum hevur hótt við at steingja ta týdningarmiklu sjóleiðina, um Vesturheimurin setir tiltøk í verk ímóti iranska oljuútflutninginum. Meiri enn ein triðingur av allari oljuni, sum verður flutt við tangaskipum, fer ígjøgnum Hormuz-sundið, og tað hevði tí fingið ómetaliga stórar búskaparligar og orkupolitiskar avleiðingar fyri allan heimin, um farleiðin bleiv stongd. USA hevur herskip á leiðini, og amerikanska herflotaleiðslan sigur, at herskipini skulu forða fyri, at viðurskiftini gerast ótrygg. Og USA fer ikki at leggja fingrarnar ímillum, sigur talsmaðurin hjá herflotastøðini í Bahrein. -Tann, sum hóttir við at forða sigling í altjóða sjógvi er eftir øllum at døma ikki partur av altjóða samfelagnum. Slík stig verða als ikki góðtikin, sigur talsmaðurin. Iran heldur í hesum døgum eina stóra herflotavenjing í altjóða sjógvi eystan fyri Hormuz-sundið. Ovastin fyri herflotanum, Habibollah Sayari, segði í gjár, at tað hevði verið lætt hjá Iran at stongt sundið. -Tað hevði verið sera einfalt. Ja, lættari enn at drekka eitt glas av vatni, segði ovastin í samrøðu við eina iranska sjónvarpsstøð. Hann legði afturat, at Iran hevur fult eftirlit við Hormuz-sundinum. Franska stjórnin mælti í gjárkvøldið Iran frá at órógva skipaferðsluna í sundinum. Talsmaðurin hjá franska uttanríkisráðnum, Bernard Valero, segði, at Iran eigur at virða fólkarættin og serliga frælsið hjá skipum at sigla í altjóða sjógvi.